## Vildi ikki doypa barnið

Í Noregi hevur ein prestur sýtt fyri at doypa eitt barn, tí tær báðar kvinnurnar, sum hava barnið, eru samkyndar. Presturin, sum eitur Nils Beite, sigur við Sunnmørsposten, at hann hevur eina áskoðan, sum er 2000 ára gomul og grundfest í Guðs orði. Eftir teirri áskoðanini er tað ikki rætt, at samkynd búgva saman, og teirra børn veksa neyvan upp í samsvari við ta kristnu trúnna, sigur hann. Tað lítla barnið hjá teimum samkyndu kvinnunum bleiv kortini doypt í kirkjuni, tí prósturin í økinum hevði einki ímóti at doypa tað, skrivar Sunnmørsposten.



## Avgerðin í filmskapping

Næmingar á Tekniska skúla í Klaksvík eru við í finaluni í stórari norðurlendskari filmskapping, sum verður avgjørd í dag. Kappingin, sum er fyri ungfólk, verður hildin í sambandi við altjóða veðurlagsráðstevnuna í Keypmannahavn. Uppgávan var at gera ein stuttfilm um avleiðingarnar av Co2 útláti. Væl yvir hundrað filmar komu til kappingina, og millum teir 8 filmarnar, sum komu í finaluna eftir atkvøðugreiðslu, var filmurin The Burden, sum næmingar á Tekniska skúla í Klaksvík hava gjørt. Nú skal ein dómsnevnd gera av, hvør skal vinna kappingina, og úrslitið verður kunngjørt í dag. Vinnarin av kappingin fær 2000 evrur í virðisløn, og virðislønir eru eisini til nummar tvey og trý.



*Ravmagnsnýtslan hjá føroyingum hevur seinastu vikuna verið av grønara slagnum. Javnan hevur olja bert staðið fyri millum 23 og 34 prosent av samlaðu framleiðsluni*

*Mynd: ©Lauritz Knudsen*

# Grønir føroyingar um vikuskiftið

**Føroyska ravmagnsframleiðslan hevur verið í grønara lagi seinastu tíðina. Um vikuskiftið kom dálkandi parturin, sum er framleiddur av olju, heilt niður í 23 prosent av samlaðu framleiðsluni**

UMHVØRVI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í hesum døgum og fram til 18. desember verður veðurlagið og varandi orka eitt sera nógv umtalað evni, í samband við veðurlagsráðstevnuna í Keypmannahavn.

Hóast tað ikki er vist, um Føroyar verða nevndar í nýggju veðurlagsavtaluni, sum eftir æltan skal gerast í Keypmannahavn, eru vit hóast alt eitt sindur grøn til tíðir.

Á heimasíðuni hjá SEV kann tú fylgja við, hvussu býtið av el-framleiðsluni er í løtuni, og hvussu hon hevur verið heilt aftur til 19. januar 2007.

Farna vikuskiftið hevur verið rættiliga grønt, hvat el-framleiðslu viðvíkur.

Leygardagin vóru bert 23 prosent av el-framleiðsluni úr olju, meðan vatn stóð fyri heili 64 prosentum og vindur fyri 14 prosentum av framleiðsluni. Sunnudagin vóru 25 prosent av el-framleiðsluni úr olju, meðan 63 prosent vóru framleidd úr vatni og 13 prosent úr vindi.

Seinastu vikuna hevur framleiðslan sum heild verið sera grøn, og hava vatn og vindur verið nýtt til størsta partin av el-framleiðsluni hjá Føroyingum, meðan oljan støðugt hevur staðið fyri millum 23 og 34 prosent av framleiðsluni.

# Heðin hitta Clinton og Schwarzenegger

**Borgarstjórin og onnur umboð fyri Tórshavnar kommunu eru við, tá yvir 75 borgarstjórar úr heimsins størstu býum saman við Bill Clinton og Arnold Schwarzenegger fundast í Keypmannahavn í sambandi við stóru veðurlagsráðstevnuna**

UMHVØRVI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Undir heitinum ”Climate Summit for Mayors” verður toppfundur fyri borgarstjórar úr heimsins størstu býum í Keypmannahavn. Millum gestirnar eru borgarstjórin í Tórshavn, Heðin Mortensen.

– Hóast vit eru smá í hesum høpi, vilja vit gera okkara, fyri at bøta um veðurlagið, so framtíðar ættarlið eisini kunnu njóta gott av hesi jørð og liva væl her, langt fram í tíðina. Tá vit vóru ein av 100 býum, ið fingu innbjóðing, tóku vit beinanvegin av, sigur Heðin Mortensen.

– Heimsins býir standa fyri 80 prosentum av øllum CO2-útláti í heiminum, og tí mugu tað vera býirnir, ið ganga undan, skulu vit fremja batar fyri veðurlagið. Havnin er kanska tann minsti av høvuðsstøðunum, ið verða umboðaðir, men vit halda tað kortini hava týdning, at vit eru við.

Umframt borgarstjóran, verða eisini Ingibjørg Berg, kommunustjóri, og Jákup Egholm Hansen, tekniskur stjóri, við til toppfundin, ið væntandi kann geva íblástur til orkusparandi tiltøk og grønar loysnir, sum Havnin og Føroyar annars kunnu taka til sín.

Umboðini fyri Havnina fara eisini at kunna um átøk, Tórshavnar kommuna hevur sett í gongd ella hevur ætlanir um, so eisini onnur kunnu fáa vitan um, hvat hendir á veðurlags- og umhvørvisøkinum í føroyska høvuðsstaðnum. Av hesum kunnu nevnast fjarhitaskipan og ókeypis bussleið.

Millum tey kendu nøvnini, ið eru við á toppfundinum, er fyrrverandi amerikanski forsetin, Bill Clinton, ið verður høvuðstalari týsdagin 15. desember á einari serligari pavillon á Ráðhúsplássinum í Keypmannahavn. Mikudagin 16. desember verður Arnold Schwarzenegger, sum er guvernørur í amerikanska statinum Kalifornia, heiðursrøðari á ráðhúsinum.

Harumframt skal borgarstjórin til kongaliga móttøku á Amalienborg við Fríðriki krúnprinsi og til móttøkuna “Seal the Deal”, sum ST skipar fyri.

# Skattaprosentið upp í Sundalagnum

**Bert fáar íløgur verða gjørdar í Sunda kommunu í 2010, og skattaprosentið fer upp komandi ár. – Verandi tænastustøði skal haldast, sigur Kim Durhuus, borgarstjóri**

FÍGGJARÆTLAN
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Íløgur í millum annað Felagsskúlan á Oyrarbakka og skúlan í Hósvík hava tyngt um skuldina hjá Sunda kommunu seinnu árini. Nú skal verandi tænastustøði haldast, og tí hækkar skattaprosentið upp í 21,5 prosent*

*Mynd: Savnsmynd*

Meðan samfelagshjólini mala spakuligari, er neyðugt at laga útreiðslurnar hjá kommununi eftir hesum umstøðum.

Sunda kommuna hevur, eins og fleiri aðrar kommunur, gjørt av at hækka skattaprosentið komandi ár. Bygdaráðið samtykti mánakvøldið 2.desember, við stórum meiriluta, fíggjarætlanina fyri komandi ár.

Aftaná fleiri ár við stórum íløgum, serliga á skúlaøkinum og við nýggjum útstykkingum, hevur bygdaráðið gjørt av, at bert fáar íløgur verða gjørdar í 2010.

- Vit halda okkum vera so væl fyri á flestu økjum í dag, at tað ber til at stegða á í komandi ári, hóast tað altíð eru ynski um útbyggingar. Við fíggjarætlanini fyri komandi ár vilja vit fyrst og fremst tryggja okkum, at tænastustøðið í mestan mun verður varðveitt, sigur Kim Durhuus, borgarstjóri.

Skuldin hjá kommununi liggur um eina stíva álíkning, góðar 45,6 milliónir krónur anno 2008, og tí er tað ikki nøkur gongd leið at lána seg burtur úr dagsins støðu, sigur kommunan. Við lækkandi skattainntøkum sær bygdaráðið seg noytt til at hækka skattaprosentið í 2010. Tað fer frá 20,6 til 21,5 prosent. Barnafrádrátturin verður framvegis 5.000 krónur fyri hvørt barnið. Systkinaavsláttur verður tann sami sum undanfarin ár, og gjøldini fyri barnaansingina verða somuleiðis óbroytt.